MÁLTEIGURIN

Sviar - svenskarar

»...Soleiðis gera sviar (ella svenskarar, sum blaðmaðurin nevnir teir)«.

Hesi orð skrivaði onkur dulnevndur 'Málvinur' í lesarabrævi í Sosialinum á sumri 1993 (hví skrivar so mangur málvinur undir dulnevni?). Undirritaði hevði formastað seg til at skriva 'svenskarar' í eini blaðgrein, og tað mundi hesin dulnevndi málvinur bara ikki fyrigivið mær - tí allir rætthugsandi føroyingar »vita«, at tað eitur sviar, og at 'svenskarar' er fúl danskasletta. Tað hava vit fingið at vitað gjøgnum íslendskar orðabøkur, og tessvegna kýta føroyingar seg fyri at tosa »rætt« og siga s-sviiiiar og S-Ssviiiiaríki, hóast okkara treiska tunga so gjarna vil siga 'svenskarar'. Summi eru eisini komin eftir, at íslendingar stava sviar og Svitjóð við í. Allir føroyingar vita av, at 'í' á íslendskum verður langt i-ljóð, men kortini vilja summi »føroyska« sítt móðurmál og siga Svíaríki og Svítjóð, hóast einki fólkaslag eitur sviar. Slíkar málspillur runga illa í oyrunum - ja, tær beinleiðis svi(ð)a.


Tí trúgva skulu tit mær: í hesum førinum hevur okkara treiska tunga rætt! Fáar heimagjørdar málsligar doktrinir eru so blóðskeivar sum henda við sviunum. »Men føroyingar skulu altíð herma eftir dønum, og vit siga svenskarar, bara tí at danir siga svenskarar«, mutar onkur ímóti. Men so er als ikki. Danskarar siga svenskarar, av tí at svenskarar sjálvir siga svenskarar. Svenskarar kalla seg sjálvar svenskarar og ikki sviar. Sviarnir eru ættfedrar til summar svenskarar, men verri enn so allir. Nógv vatn er runnið í Málaren, síðani sviarnir lógu í orrustu við geytarnar (o.u. 100 e.Kr.), og Svøríki var ikki til sum politisk eind tá. Síðani tá eru bæði sámalandið, danskir og norskir landspartar lagdir aftrat tí svenska ríkinum, og undir hansatíðini fluttu handverkarar og handilsmenn úr øllum ættum til Svøríkis. Tá ið so mong ymisk fólkasløg hittast, plagar úrslit at spyrjast burturúr, bæði so og so. Tískil er tað beinleiðis ósøguligt at kalla íbúgvarnar í Svøríki fyri sviar (so mugu vit vera konsekvent og kalla íbúgvarnar í Suðursvøríki geytar, og føroyingar kundu fyri tað kallað seg sjálvar írskt munkayngul). Og tað er fullkomiliga burturvið at pástanda, at 'svenskarar' er óføroyskt orð og málspilla.

Undir tí nationalromantiska tíðarskeiðnum í hinari øldini fóru svenskarar eins og grannafólkini at dyrka fortíðina. Teir bæði skálaðu og skrálaðu og róptu leingi livi fyri Moder Svea og Kongi og Peri og Póli, søgufróðir hugsjónarmenn stovnaðu Götiska Förbundet, Svea Orden og góvu út Svea Folkkalender, skaldini lovprísaðu bæði Moder Svea, Svea Banér og Svea Rike i føgrum orðum og mangt annað slíkt. Í øllum hesum nationalromantiska rúsinum vóru svenskarar tó allatíðina greiðir yvir, at teir vóru **svenskarar** - hvørki sviar ella geytar, hóast summir teirra vóru *eftirkomarar* til hesar stammur. Máti skuldi vera við galskapinum, og 'derr settu teir grensuna'.

Sum frá leið, hasaði hesin nationalromantiski rúsurin av í Svøríki, men ikki í Norðuratlantshavi. Og síðani hava føroyingar lúrt í íslendskar orðabøkur og eru (á skeivum grundarlag) komnir eftir, at 'svenskarar' mestur er málspilla, og at 'sviar' ljóðar bæði ramligari og fornari. Jú, so er - ramligari og fornari. Men rættari... hvussu tá? Í aðrar mátar vilja vit jú vera søguliga korrektir og kalla tískil Frankaríki fyri Frakland og eingilskt fyri enskt. Tá ið vit ikki vilja vita av øðrum germanskum stammum, hví skulu vit so endiliga halda fast við danir og sviar? Eisini undrar tað meg, at íslendingar ikki vilja kennast við orðið 'svenskarar' tá ið teir uttan at himprast kunnu siga bæði svenskt og svenskur. Her lekur ímillum teori og praksis.

Nakrar av teim fáu »leivdunum« úr svenskari fornøld eru nøvn sum t.d. Svea Hovrätt og Svea livgarde. Men grundlógin eitur sjálvandi Sveriges Rikes Lag, ikki SveRikes Lag. So kæru landsmenn! *Tvingið* ikki hvønnannan at siga sviar, Sviaríki og Svitjóð. Tá kunnu tit meir enn so fara at merkja svi(ð)an av málsligum heimføðiskapi. Hvat høvdu tit sagt, um danskarar knappliga fóru at bølva oman yvir »de dumme sveer«?


Heri Eysturlíð, Stockholm



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Laura Køtlum
750 Viðareiði

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: LEIKPARTAR



Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunarorð: **197**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Barnarímur** - *Hans A. Djurhuus/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Kalr N. Hansen týddi*

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- ❑ **Tit bygdu hetta land - Arbeiðsmarknaðurin** - *Jákup Pauli Strøm*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt